# Monopolið verður brotið

**Stjórin á Ferðaráði Føroya væntar ikki, at monopolstøðan, sum í løtuni er galdandi á loftferðsluøkinum fer at standa við. Hann væntar, at kapping aftur verður um ferðafólkini**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*



*Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráði Føroya, væntar ikki, at Atlantic Airways verður verandi einsamalt á Føroyarutuni. Monopolið verður brotið, sigur hann*

Heri niclasen, stjóri á Ferðaráði Føroya, heldur ikki, at monopolstøðan, sum Atlantsflog í løtuni hevur á loftvegis Føroyarutunum, ferat standa við. hann metir, at tað fer at verða kapping aftur um ferðafólkini.

– Nei eg meti ikki, at monopolstøðan er íkomin fyri at vera. Fyri 5 mánaðum síðani hevði eg allarhelst sagt ja, sigur Heri Niclasen. Men við teirri ferðatrongd sum liggur í mongum menniskjum um at sleppa burtur eina tíð - ofta fleiri ferðir árliga - fyri ein sámuligan prís, samanhildið við liberaliseringar innan flogferðsluna kring heimin og stóru framgongdina hjá lágprísfeløgum, er tað ongin kraft í verðini, sum í longdini kann fora føroyingum í at fáa ein góðan bita av hesi køkuni.

## Kapping og prísir

Ført hevur verið fram, at útboðið av flúgvarasetrum er minkað, at ferðaseðlaprísirnir eru ov høgir, og at tað er óheppið, at ongin kapping er á flogrutunum til Føroya.

Heri Niclasen sigur, at er tað nakað, sum kann halda ein »en garde« og altíð hava antennurnar úti, so er tað júst hetta at vera í kapping við onkran annan. Tá ræður um altíð at liggja fremstur. Tá ongin kapping er, liggur tú altíð fremstur. Men í mun til hvat? spyr ferðavinnustjórin.

–Tá tú kemur inn í eina monopolstøðu, kanst tú hava so góðar intentiónir, sum tú vilt, og garantera bæði líkt og ólíkt. Men sum tíðin líður, uttan at tú merkir tað í gerandisdegnum, byrjar »bacillan« at gera um seg, og tú fert á glið so ella so, uttan at tú ætlaði tað. Tað er bara so, staðfestir hann.

Heri Niclasen sigur, at tá hann arbeiddi í Smyril Line, sum var í kapping við DFDS á Føroyarutuni, var tað altíð lættari at áseta prísirnar til Íslands har ongin kapping var, enn at áseta teir millum Føroyar og Danmark har Winston Churchill eisini sigldi.

Starvsfelagi hansara í DFDS segði seinni, at teir altíð bíðaðu, til Smyril Line hevði ásett ferðaseðlaprísirnar, og so komu teir aftaná og løgdu seg uml. 10% undir.

–Soleiðis var tað bara, og tað helt okkum aftur við ikki at vera alt ov gramligir á Føroyarutuni. Slíkt er bara gott, og kappingin kemur altíð kundunum til góðar. Við nýggju Norrönu er komforturin hækkaður munandi og kapaciteturin øktur uml. 50%, sigur Heri Niclasen.

Hann vil ikki gera viðmerkingar til kostnaðarstøðið á flogferðaseðlum millum Føroyar og Danmark. Tað eigur ferðavinnan og onnur vinna sjálv gera vart við.

Og tað hava teir eisini gjørt, frættist í fjølmiðlunum, sigur hann og sipar til tað, hotelfólk í seinastu viku søgdu um, at ov lítið pláss var til fremmand ferðafólk, sum ætlaðu sær hendanveg um summarið.

–Mín fakligi áhugi liggur í, at Atlantic Airways syrgir fyri, at ríkiligt av kapaciteti altíð er til staðar til øll sløg av ferðandi, og at teir arbeiða væl og virðiliga við breiðum viftum av prísstrukturum og marknaðarføring fyri at fáa ferðafólk til Føroya. Hinvegin skilji eg væl, at Atlantic Airways roynir at fáa nakrar krónur í kassan. Flogfør teirra eru ikki heilt ung longur og skulu skiftast út um ikki so langa tíð, og tá tosað vit um risaupphæddir, sigur Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráði Føroya.

# Ferðamøguleikarnir betri enn fyrr

**Stjórin á Ferðaráðnum skilir ikki rættiliga teir gistingarhúseigarar, sum halda, at manglandi gistingar um summarið standast av verri ferðamøguleikum. Tí vit hava helst eini 1.000 flogsetur fleiri og rættiliga nógv betri kapasitet sjóvegis, sigur hann**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Stjórin á Ferðaráði Føroya, Heri Niclasen, metir ikki, at grundin til, at færri gistingar eru á føroyskum gistingarhúsum í juli, enn pláss er fyri, er orsakað av ov lítlum flutningskapasiteti. Sjálvur metir hann,a t í ár eru umleið 1.000 flogsetur fleiri til taks, enn í gjør. Og Norröna hevur seinastu trý økt flutningsmøguleikarnar munandi.

Orsøkirnar til færri gistingar í juli kunnu vera fleiri, metir Heri Niclasen. Ein tann mest vanliga orsøkin til hetta fyribrigdið hjá bæði flutningsfeløgum og gistingarhúsum plagdi at vera, at fyritøkurnar lótu út stór "allotments" (fyribilsbíleggingar) til bólkar hjá útlendskum ferðavinnufyritøkum, sigur hann. Tá so onnur ferðafólk royna at bíleggja sær pláss fáa tey at vita, at gistingarhúsið er fullsett. So kann sjálvandi tað keðiliga henda, at fleiri bólkabíleggingar vera avlýstar, og gistingarhúsið stendur við tómum kømurum, eftir at hava víst øðrum bíleggingum frá sær. Tá ov stórar bólkaavlýsingar knappliga koma inn, kann tað vera trupult at fylla upp aftur í eini handavending.

Hvussu stórur hesin trupulleikin er ídag, sigur Heri Niclasen ikki vita. Men gistingarhúsini eru nógv í dag meira avgjørd við bólkabíleggingum, har strangari reglar fyri depositum, gjaldi og fráboðanum seta túroperatørunum harðari treytir.

Hetta er væl skiljandi, tí gistingarhúsið kann missa væl av peningi, um túroperatørurin fær loyvi til at avlýsa ov stutt áðrenn fráferð. Ferðavinnutíðin í Føroyum, har peningur skal vinnast, er avmarkað. Men tey sum kanska kunnu svara hesum spurninginum best, eru tey føroysku incomingfeløgini sum eisini hava dagliga samskiftið við gistingarhúsini, sigur Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráði Føroya.

–Er tað so, at flutningskapaciteturin er ov lítil, hava vit ein álvarsligan trupulleika. Tí tá kann tað koma fyri, at ferðandi føroyingar, sum fara av landinum at brúka valuta, fora útlendskum ferðafólki at koma til Føroya at brúka teirra valuta. Mær vitandi økir Atlantic flúgvitíttleikan á Danmarkarrutuni nú Maersk Air ikki flýgur her longur. Um hetta er nøktandi, kann eg ikki siga nakað um. Men um eg ikki fari heilt skeivur meini eg, at Atlantic Airways og Maersk Air í juli mánaði í fjør samanlagt útbjóðaðu uml. 13.500 setur úr Danmark til Føroya. Eg vil meta at Atlantic Airways í juli 2005 hevur eitt útboð uppá uml. 14.500 setur úr Danmark til Føroya, altso uml. 1000 fleiri. Um hetta er ov lítið til at nøkta tørvin, ið er, dugi eg í løtuni ikki at meta um, sigur stjórin á Ferðaráðnum.

Tá Winston Churchill í 1992 gavst at sigla uppá Føroyar, var tað ein trupulleiki, at ov trongt var á Danmarkarrutuni hjá gomlu Norrönu. Vandi var tá fyri, at føroysk ferðandi millum Danmark og Føroya foraðu europearum í at fáa pláss við gomlu Norrönu á teimum longu og kostnaðarmiklu strekkjunum til Íslands. Hesin trupulleikin var loystur við einum snildisligum samspæli millum taktiskar prísir, fráferðarhavnir og ferðadagar. Serliga við at slúsa føroyingar umveigs Bergen, vísir Heri Niclasen á.